# ARBEIÐSEFTIRLITIÐ

*Administration of Occupational Safety and Health*

Fútalág 1B ✪ P.O.Box 1134 ✪ FO-110 Tórshavn ✪ Faroe Islands

Tlf. +298 317811 ✪ Fax +298 314489 ✪ E-mail: info@arbeidseftirlit.fo



***Skrásetingar nr.:***

**L-C007-1**


# Leiðbeining
# um
# avrættarar til træsmíð

Avrættarar skulu verða væl útgjørdir og nýttir við skili eftir reglunum í arbeiðaraverndarlógini og kunngerð um teknisk hjálpartól v.m., sum Arbeiðseftirlitið umsitur:

***Brúkaravegleiðing***.

Fyri allar útveganir (sølu, leigu og lán) er galdandi, at skrivlig vegleiðing skal latast, sum er orðað á føroyskum ella donskum máli, við frágreiðing um nýtslu og viðlíkahald.

***Útbúnaður.***

Haldarin (kutteren) skal ikki vera fýrhyrntur.

Avrættarin skal hava yvirverju yvir høvulsjørnunum, báðu megin atløgufjølina. Yvirverjan á bak-síðuni skal vera fest í atløgufjølini soleiðis, at jørnini eru fjald. Yvirverjan framman fyri atløgu-fjølina - avrættaraverjan - skal vera haldgóð og løtt at nýta.

Avrættarverjan er haldgóð og løtt at handfara tá hon:

- lættliga kann stillast í hædd og síðustøðu
- verður verandi í stillaðu hæddina og av sær sjálvum aftur í hesu hædd, hóast hon verður lyft upp ella trýst niður
- sum altíð stendur loddrætt yvir høvulsjarnopið, ikki bundin at tjúktini av arbeiðsevni ella stillingin av atløgufjølini.

Har smærri avrættarar eru við høvulsjarnopið, (upp til 100 mm) kann flytbar verja nýtast.

Høvulsjørnini skulu verða fest við trygdarkíla.

Konstruktión í strikumyndunum 1 og 2 er nýtilig.

***Lógarheimild:***

Løgtingslóg nr. 58 um arbeiðaravernd frá 24. mai 1974 við seinni broytingum.
Kunngerð nr. K-E015-1 um inrætting av tekniskum hjálpartólum frá 4. september 1995.


| *Útgivið fyrstu ferð:* | *Seinastu broytingar:* |
|---|---|
| **21. mai 1988** | **23. januar 1996** |



**Strikumynd 1.** *Høvulsjarn fest á haldarin (kutteren)*




**Strikumynd 2.**

Hvør avrættari sær skal hava nullspenningsfráfall, sum forðar fyri at hann ótilætlað fer í gongd
tá streymslit er ella ólag er á ljósnetinum. Koblingin skal vera nærindis startútgerðini.

Start- og stopútgerðin skal vera lætt atkomilig.

Startútgerðin skal vera tryggjað móti ótilætlaðum ávirkanum. Hetta kann gerast - eitt nú við

- at startútgerðin er innfeld, fjald ella útgjørd við kraga.
- at snúningsbrótari er útgjørdur við krage, uttan so at konstruktiónin ella uppseting forðar fyri ótilætlaðum ávirkanum.

Ein bremsa skal vera, sum steðgar seinast 10 sekund eftir at maskinan er sløkt.

***Nýtsla***

Høvulsyvirverja skal nýtast meðan arbeitt verður.

Góðtikin nýtsla av høvulsyvirverju er víst í strikumyndini 3, 4 og 5.

**Strikumynd 3**
1. Haldari til høvulsjarn
2. Yvirverja
3. Yvirverja aftan fyri atløgufjøl

Tá høvulsverjan verður nýtt rætt (**Strikumyndir 4**):







*Tunn arbeiðsevni* *Evni sett upp eftir kanti*
*Evni yvir 75 mm*

Tá smærri evnir verða arbeitt, skal hjálpiambod nýtast, sí strikumynd 5.

Tá høvulsjørnini skulu skiftast út, skal ásurin festast við skrúvulykli, sum tekur um sløttu flaturnar á ásinum.



**Strikumynd 5.**




***Viðlíkahald***

Avrættarar skulu viðlíkahaldast soleiðis, at teir altíð eru í góðum standi. Ávísing um eftirlit og viðlíkahald, sum sølumaðurin letur skal haldast.

Høvulsjørnini skulu vera hvøss. Plátan skal haldast rein og gløtt.

Viðlíkahald- og umvælingsarbeiði skal gerast tryggiliga. Orkukeldan skal takast frá við t.d. einum avbrótara - lykli.

***18 ára aldursmark***

Ungfólk undir 18 ár mugu ikki arbeiða við avrættara. Serligar reglur eru galdandi fyri lærlingar og næmingar.

**ARBEIÐSEFTIRLITIÐ**, 23. januar 1996.

Eli Davidsen, stjóri (sign.)